# rslønir 2008

## Ógvuliga fegin um heiðurin

**Eg taki hetta sum ein stóran heiður, ikki minst tí tað, sum eg føri fram í kjakinum, er so kontroversielt, sigur Hans Andrias Sølvará, sum hevur fingið ársina kjakvirðisløn**

ÁRSINS KJAKVIRÐISLØN

- Tað hevur stóran týdning at kjakast um evni, sum eru eym, og sum hava nakað at týða fyri føroyska samfelagið, sigur Hans Andrias Sølvará, sum í dag fær heiðurin av ársins kjakvirðisløn.

Ein av orsøkunum til at valið fall á hann man helst vera bókin »Guðs orð ella Orð um Guð«. Inihaldið í bókini hevur eisini staðið sum ein greinarøð í bløðunum.

Hans Andrias Sølvará er fegin um, at Miðlahúsið hevur tikið stig til tiltakið ársins kjakvirðisløn, tí tað hevur stóran týdning, at vit fáa eitt kjak í lag um øll viðurskifti.

- Ársins kjakvirðisløn kann verða við til at eggja fólki at taka lut í kjakinum. At fáa hesa viðurkenning er jú eitt herðaklapp. Vit hava brúk fyri kjaki í Føroyum, og tað er ikki altíð so lætt. Í størru samfeløgunum er munandi lættari at vera anonymur, tað er ikki so lætt í einum lítlum samfelag sum Føroyum, sigur Hans Andrias Sølvará.

Ein slík viðurkenning sum ársins kjakvirðisløn ger tað munandi hugaligari at taka lut í kjakinum, tí hendan vísir, at fólk setas prís upp á tað.

- Eg eri ógvuliga glaður fyri hendan heiðurin, mær er sýndur, og tað eggjar mær rættiliga til at halda fram við kjakinum eins og higar til, sigur Hans Andrias Sølvará.

leo



*Søgufrøðingurin, Hans Andrias Sølvará, fær ársins kjakvirðisløn fyri á djarvan, gløggan og greiðan hátt at hava víst á týdningin av einum opnum og erligum orðaskifti í samfelagnum*

*Savnsmynd*

## Skakkur og takksamur

**Tað fløvar at vita, at eisini fólk, sum arbeiða við tingum, sum ikki eru so glæsilig, eisini verða tikin við í umhugsanini, tá slíkur heiður verður sýndur**

ÁRSINS FØROYINGUR

- Eg gjørdist eitt sindur skakkur, tá eg hoyrdi tað. Hetta hevði eg ikki væntað, men eg eri samstundis eisini ógvuliga takksmaur at fáa hendan heiður sýndan, sigur Anfinnur í Skála.

Hann fegnast um, at fólk virðismeta arbeiðið við føroyskt-útlendsku orðabókunum, serliga tí tað í dag er so ógvuliga nógv fólk at velja ímillum.

- Tá eg var ungur og læs niðri í Danmark, kom tað ikki fyri, at tú sá føroying nevndan í donsku bløðunum. Í dag er tað so javnan, at tú lesur um tildømis Guðrun og Guðrun, Teit, Eivør ella Pál Joensen, sum telist millum tríggjar teir bestu svimjararnar í Europa, sigur Annfinnur í Skála.

Við hesum undirstrikar hann kappingina, hann hevur verið í, tá hann og Jonhard Mikkelsen eru valdir til ársins mannligu føroyingar fram um til dømis tey nevndu.

- Okkara arbeiði hevur ongantíð stílað ímóti viðurkenning, men hevur einans verið gjørt fyri at dugna føroyska málinum. Hetta er samstundis ein roynd at fáa fólk at hugsa føroyskt, tí tað merkist ofta, at umsett verður ú enskum til danskt og síðani til føroyskt, sigur Annfinnur í Skála.

Seinasta megnarverkið hjá honum og Jonhardi Mikkelsen, Enskt-føroyska og Føroyskt-enska orðabøkurnar, munnu helst hava verið tungan á vágskálini, tá hesir báðir vórðu kosnir ársins mannligu føroyingar. Men tað er ikki sjálvsøkni, sum hevur drivið verkið.

- Eg vóni bara, at hesi verk kunnu gerast ein kíli í føroyska málgarðinum, sigur Annfinnur í Skála.

leo




*Fyri vælaverkið – ensk-føroysku orðabøkurnar – fáa Jonhard Mikkelsen og Annfinnur í Skála heiðurin sum ársins maður*

*Savnsmynd*

## Eitt ótrúligt heiti

**Eg síggi hetta sum eina viðurkenning av tí arbeiði, sum vit hava gjørt gjøgnum mong ár, og tað fløvar, sigur Jonhard Mikkelsen, ársins mannligi føroyingur**

ÁRSINS FØROYINGUR

Spurningurin er, um eg nú skal skifta stíl, helt Jonhrd Mikkelsen skemtandi fyri, tá vit ringdu og fregnaðust eftir einari viðmerking, nú hann, saman við Anfini í Skála, er valdur til ársins føroying.

- Hetta er ein viðurkenning frá teimum, sum hava valt okkum. Tey halda væl, at tað liggur eitt ávíst virði í tí, vit hava fingist við seinastu árini, sigur Jonhard Mikkelsen.

Seinastu orðabøkurnar frá teimum báðum hevur verið eitt sera drúgv arbeiði.

- Tað var rættiliga strævi í mong ár at savna øll tey túsundtals orðini, men nú var bókin búgvin at verða givin út. Men arbeiðið heldur fram, tó at tað nú fer at bera meiri brá av ítrivi, sigur Jonhadr Mikkelsen.

Tað verður alla tíðina ein spurningur um at dagføra orðabøkurnar, og fólk ringja javnan til teir báðar fyri at fregnast um orð ella vendingar, sum ikki finnast í bókini.

- So seint sum í gjár ringdu ikki færri enn trý fólk til mín við spurningum um orð, sum tey ikki funnu í orðabókini, og tá hugsi eg, hví vit ikki høvdu hesi orð ella vendingar við, sigur Jonhard Mikkelsen.

Hann sigur, at hóast arbeiðið hevur tikið mong ár, so kemur tað veruliga í brennidepilin, tá bøkurnar verða givnar út.

- Tað liggur ein viðurkenning í hesi kjósan, og tað fløvar, sigur Jonhard Mikkelsen, ársing mannligi føroyingur 2008.

leo